# Dragandi og hugtakandi



Eivør og Birgir vóru dragandi og fangandi á pallinum

**Jól eru bara einaferð um árið, men stendur valið millum Eivør og jólamannin, er lítið at ivast í, hvat konsertfólkið tekur fram um, tá ið jólamánaðin kemur aftur um eitt ár**

*Orð: Eyðun Klakstein*
*Myndir: Tom Laursen*

– Hey, hallo. Vit skulu hava eina ljóðroynd við Eivør.

Ljóðmaðurin rópar á brúnni, nú hann hevur skrúvað knøttar, so kórið á konsertini fer at ljóða væl.

– Hvar er Eivør, spyr onkur niðri í salinum.

– Hon er uppi á.

Klokkan er farin at nærkast átta, og út i í gongini standa fólk spent og bíða eftir at sleppa innar at lurta.

Høvið er jólakonsert við Eivør Pálsdóttir, og pallurin er í Mentanarhúsinum í Fuglafirði.

– Steingrund, vit hava bara fimm minuttir.

– Ja, men hetta mugu vit hoyra. Spæl okkurt saman við henni. Eg eri klárur.

Og so ljómar fagrasti jólatónleikur alt í einum. Eivør og Felagskórið Gøta/Leirvík tríva í ein sang saman, og tað skal ikki skrúvast og flytast nógv, fyrr enn ljóðmaðurin er nøgdur.

Klokkan er nakrar minuttir í átta.

– Eivør, ert tú nøgd, spyr maðurin á brúnni.

– Ja.

– Tað eri eg eisini.

So er leyst og liðugt. Eivør og hinir sangararnir fara úr salinum, og so verða dyrnar í hinum endanum latnar upp, so fólkið kann streyma innar at finna sær sessir.

## Stríð um eyguni

Nógv fólk er komið í snotuliga Mentanarhúsið í Fuglafirði hetta kvøldið í desember mánaði. Myrka og kalda vetrarveðri skapar góðan karm um jólakonsertina, men inni í húsinum er hvørki kuldi ella myrkur.

Har er lagt í eldin til eina stórsligna konsert við evnaríku songkvinnuni úr Gøtu, sum hevur ferðast úti og heima og hugtikið fólk.

Eivør Pálsdóttir.

Hóast talan er um blaðunga kvinnu, ljóðar navnið longu sum nakað heilt serstakt í mongum knokki her á landi. Nakað sum hevur verið har leingi. Nakað sum øll vita um. Her er ein kvinna við eini undurfagrari rødd. Ein sannur songfuglur.

Eivør hevur seinastu árini havt jólakonsertir, og tær hava verið nakað serstakt. Fólk eru farin hugtikin heimaftur, og tað eru kanska royndirnir av hesum konsertum sum gera, at fólk hava so góðan hug at leita aftur til jólakonsert við Eivør.

Eivør er ikki meira enn farin úr salinum eftir ljóðroyndina, tá ið hon kemur inn aftur. Nú er hon í fylgi við trimum íslendskum tónleikarum, sum skulu spæla undir hjá henni.

Gittarspælarin minnir um ein blíðsníðaðan fólkaskúlalærara, sum hevur forsovið seg, tá ið hann válar inn á pallin, men tað er meira enn »Ása sá á« á skránni, tá ið hann fer at spæla. Og soleiðis er eisini við hinum báðum monnunum. Teir eru dugnaligir tónleikarar og ikki minst bassspælarin, Birgir Bragarson, hevur eina dragandi megi. Hann livir seg fullkomiliga inn í tónleikin, strálar av spæligleði og gevur stundum Eivør – stjørnuni sjálvari – dyst um eyguni í salinum.

## Fitt og friðarligt

Eitt bland av egnum sangum, jólasangum og sálmum er á skránni hetta kvøldið. Tað er vakurt, mjúkt og hugtakandi. Alt frá teimum kendu sangunum til teir minni kendu, sum Eivør sjálv hevur skrivað.

Eina løtu fær Eivør hjálp frá Felagskórinum Gøta/-Leirvík, og tað riggar óføra væl. Eivør dugir bæði at draga nakað í land, so kórið sleppur fram at, men hon nýtir eisini onkur høvi til at leggja seg frammarliga í myndina sum tann opinlýsi solisturin. Pie Jesus kemur rættiliga í hæddina, og áðrenn fólk verða send út úr salinum at leska sær á við kaffi og rísgreyti, syngja Eivør og kórið sálmin Halga Nátt – yndisligt og reint.

Stílurin á konsertini er ikki at fara skeivur í. Tað skal vera passaliga stilt, hóast onkur uppøsing er at hóma á pallinum. Eg rósu upp sá næla stendur sera sterkur í myndini. Eivør sang hendan sangin framúr væl – sum hon annars gjørdi alla konsertina – og teir frálíku tónleikararnir á pallinum komu rættiliga til sín rætt, tá tónleikur gjørdist eitt sindur meira lívligur og svingandi. Kanska var tað bara hetta, tú saknaði eitt sindur á hesi frálíku konsert. Kanska kundu ein ella tveir sangir afturat verið, har ferðin var eitt sindur hægri.

## Skrivar sjálv

Eivør hevur dirvið. Hon dugir at hertaka salin, at liva við í tónleikinum og smitta áhoyrararnar við síni avlopsmegi. Hon torir eisini at brúka sína egnu sangir. Og tað er eingin orsøk at smæðast. Eivør skrivar góð løg, og hon dugir eisini at seta orð á sína tankar og kenslur.

Hon spælir fleiri av sínum egnu sangum, og hon endar konsertina við einum spildurnýggjum lagi. Hon tekur til, at lagið kanska ikki er liðugt enn, men hon vil royna at spæla tað. Og tað gera hon sannførandi. Enn eitt hugtakandi lag, ein tekstur, sum ikki fjalir út yvir nakað, hóast heitið ikki er sett á feska sangin enn.

Eivør er eitt upplivilsi, hvørja ferð hon er á pallinum. Hon er sum eitt gosfjall, tá hon er á palli saman við rockbólkinum Clickhaze, og hon er sum tann ein litføgur fløta, tá hon sum hetta kvøldið syngur teir friðarligu jólasangirnar. Dragandi, hugtakandi og fjølbroytt.

Jól eru bara einaferð um árið, men stendur valið millum Eivør og jólamannin, er lítið at ivast í, hvat konsertfólkið tekur fram um, tá ið jólamánaðin kemur aftur um eitt ár.

Ein framúr songkvinna, men eisini ein dugnaligur komponistur





Eivør saman við kórinum. Tey sungu tveir sangir saman



Gittarspælarin Edvarð Lárusson spældi sum hinir báðir landsmenninir á pallinum – Petur Gretarson og Birgir Bragarson – framúr væl

Ein fittur flokkur av gentum settu eitt flott punktum á konsertini, tá tær gingu Luciagongd og sungu saman við Eivør





Áhoyrararnir vóru nógvir í tali